# - Eg havi ein 6. s

**Á Norðasta Horni:**

Við ýlandi ferð fara bilarnir strúkandi framvið hesum manninum, sum gongur í niðaru síðu á vegnum.

Onkur heldur seg bera kenslu á hann, meðan onnur undrast á, hvat hesin maðurin so ofta ger harúti á leiðini.

Hann er lættur at kenna aftur: Lágur á vøkstri, í cowboy-jakka og buksum og uttan nakað á høvdinum.

Tað sum kortini ger henda mannin øðrvísi enn aðrar menn er at hann altíð – ikki bara av og á – men ALTÍÐ hevur tveir plastikkposar í hondini. Í dag ein gulan og ein hvítan.

Maðurin gongur við nógvari ferð, steðgar á viðhvørt, gongur so nøkur fet aftrat, boyggir seg niður, tekur ein glaskendan lut upp og koyrir hann í posan.

Hann gongur víðari, steðgar á eina ferð enn, hyggur niður fyri seg, boyggir seg niður, tekur enn ein slíkan lut upp og ristir við høvdinum. Hesaferð var eydnan ikki við honum: Henda fløskan var brotin.

Longur heimi, nærhendis Krossinum sæst, at nú er byrðan vorðin tyngri. Tann guli posin er á tremur við fløskum, og lítið vantar í, til hin hvíti posin eisini er fullur.

Tá knappliga sær hann fleiri fløskur liggja á einum og sama staði. Hann skundar sær hagar, tekur tær upp, og trýstir ta seinastu fløskuna niður í posan. Tú sær eitt bros fara um varrarnar, tí nú er gerningurin lokin.

Við ferð sært tú hann nú taka báðar posarnar í hond, og leggja leiðina oman móti sølustaðnum hjá Føroya Bjór í Akranesgøtu.

Har verður hann væl móttikin av einum av starvsfólkunum.

- Hey, Janus. Nú eri eg aftur, sigur Bagge, og byrjar at tøma fløskurnar á borðið.

- Hey, Bagge. Tú ert óførur. Aftur í dag hevur tú gjørt kvetti, sigur Janus Nicolajsen.

Teir báðir kennast væl frá diskinum í Føroya Bjór. Hetta er ikki fyrstu ferð at Bagge er komin har við fløskum. Og heldur ikki tann seinasta.

Janus telur fløskurnar og faldar talið við 1,25 kr. og fer í kassan eftir peninginum. Bagge fær peningin í hondina. Hann telur errin peningin einaferð aftrat, og so eru ørindi hansara liðug í dag.

Ein einstøk fløska kastar kanska ikki so nógv av sær. Men tá tær gerast nógvar og uppaftur fleiri, so kann tað skjótt blíva til okkurt.

Eitt grundøki, til dømis!

**Bagge hevur fyrr kent til, hvat ein full fløska kann gera við ein mann. Tey seinastu 20 árini hevur hann hinvegin sæð virðið í teimum tómu fløskunum. Hann hevur higartil selt fløskur fyri 300.000 kr., sum hann hevur goldið grundøkið fyri. Í hesi vikuni kann hann flyta inn í egin sethús í Guttormsgøtu í Havn. – Tað følist so óveruligt, sigur ein ikki sørt errin Bagge**

HAVNARMYND
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** - Eg eri ein orginal! Skal ein lýsa Bagge, so er helst best at lata hann sjálvan gera tað við egnum orðum:

- Jú, eg eri orginal. Eingin ivi um tað, og eg havi heldur einki ímóti at vera orginal. Tað havi eg verið heilt frá barnsbeini, sigur hann.

Bagge sigur seg vera millum teir fyrstu, sum høvdu langt hár. Hann hevur eisini gingið uttan eitt einasta hár á høvdinum. Hann hevur gingið í knallreyðum buksum, og hann var millum tey fyrstu sum regluliga runnu kondi.

- Nú er alt hetta ikki so óvanligt longur. Tí nú gera øll tað sama, sigur Bagge.

Tað er kortini sum orginalur, at Bagge fyri eini 15 árum síðani setti sær eitt stórt mál fyri: Eg vil eiga míni egnu hús.

Í hesi vikuni er hetta málið vorðið til veruleika!

## Eingin superman

Hugsanin um ein dag at kunna flyta inn í egin hús hevur bara ment seg dag fyri dag, ár fyri ár.

Ikki tí, - arbeiðið hevði hann einki, og livdi tískil bara av avlamishjálpini og teimum tómu fløskunum, hann savnaði saman. Hann veit, hvørjar fylgjur innihaldið í teimum fullu fløskunum kann hava, men hann veit eisini, hvat virði er í teimum tómu fløskunum.

Við hesum báðum fíggingarmøguleikum, avlamishjálpini og úrtøkuni frá fløskunum, byrjaði hann fyrireikingarnar til – kanska lívsverk sítt - hesi sethúsini, sum hann í hesi vikuni flytir inn í.

- Eg vildi simpelthen prógva yvir fyri mær sjálvum, at hetta kundi bera til. Ja, eg setti mær hetta sum mál, tí nú vildi eg gjarna gera nakað fyri samfelagið.

- Men lat meg so siga beinanvegin, at eg, Bagge, ikki eri nakar superman. Eg vil tó fegin at onnur skulu vita, at eg havi ongatíð mist mótið, hóast nógva mótgongd. Eg havi altíð havt áræði og eg havi altíð noktað at geva upp. Eg vil eisini vísa øðrum, at tað ber til, um ein trýr uppá tað.

- Og úrslitið av øllum hesum – tað síggja tit her, sigur Bagge, sum errin vísir okkum runt inni í nýggja heimi sínum.

## Klók orð frá Kennedy

At Bagge nú kann flyta inn í egin hús er fyrst og fremst av eini einstakari orsøk: Hann óttaðist fyri at verða koyrdur út á gøtuna frá leigarum sínum.

Hann hevur búð í mongum íbúðum, harav tey seinastu sjey í eini íbúð í Lynggøtu í Havn. Nú kann hann fattur, og við høvdinum høgt flyta inn í egin hús í Guttormsgøtu.

- Eg eri sjúkur av neurosu, men eg vildi fegin koma burtur úr tí. Tí var neyðugt hjá mær at gera okkurt sjálvur. Eg mátti simpelthen taka meg sjálvan í nakkan og handla.

- Eg vildi gera nakað sjálvur. Einki við at fáa onnur at gera alt fyri meg, sigur hann.

Í sama viðfangi siterar hann ein av monnunum í heimssøguni, sum hann hávirðir – fyrrverandi amerikanska forsetan, John F. Kennedy, sum jú bað fólk um ikki at spyrja eftir, hvat landið kundi gera fyri tey, men hvat tey kundu gera fyri landið.

- Hetta eru sera klók og sera sonn orð, sigur Bagge. Hann veit tó, at hesi orðini kunnu ljóða sum ein mótsøgn yvir hansara lív, tí hann jú fær hjálp frá tí almenna.

Men hetta hevur kortini ikki tikið dirvið og áræðið frá honum til at fremja hugskotið um síni egnu hús. Fløskurnar fíggja alt

Skal ein tosa um starv ella størv hjá Bagge, so er tann søgan ikki so long: Hann arbeiddi m.a. eitt skifti á Tunnuvirkinum í Havn, eins og hann hevur verið læraravikarur í t.d. Hvannasundi og í Elduvík.

Síðani miðskeiðis í sjeytiárunum hevur hann kortini ikki havt nakað fast arbeiði. Hann fekk tá játtað sosialhjálp og seinni avlamishjálp. Tað er henda hjálpin, sum er annar av fíggjarligu grundstuðlum hansara í dag.

Tað var í byrjanini av 80'unum at hann av álvara byrjaði at savna fløskur í Havn – eitt virksemi, sum hevur verið við til at gera hann til eina eyðkenda havnarmynd.

- Eg byrjaði at savna fløskur, tí eg ynskti at klára meg sjálvan fíggjarliga. Í dag kann eg tí siga, at fløskurnar hava sera stóran týdning fyri meg.

- Og tað er ikki fyri at reypa, - men eg havi ikki keypt eitt einasta plagg og eg havi heldur ikki etið eina einastu máltíð við pengum, sum onnur hava goldið í





*Hann gongur so trúliga á vegnum til Norðasta Horn. Hetta er eitt gott mið til tómar fløskur, tí tann eina dagin í vikuni gjørdist úrtøkan ikki minni enn 60 kr. bert á hesum vegastrekkinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*